# Gamla pulturkamarið gjørdist hugnaligt dreingjakamar



Blekkspruttur og fiskar eru partur av »havtemaðinum« í kamarinum



**Familjan Streymoy hugsar ikki sum vit onnur. Tá vit síggja eitt óbrúkiligt pulturkamar, síggja tey eitt hugnaligt dreingjakamar. Tá vit stappa barnakamarið fult av leikum, gera tey tvey kømur – eitt at spæla í og eitt at sova í**

Familjan er Alice og Anders – og børnini Rúni, 6 ár, Atli, 3 ár og Erla, 1 ár. Alice er føroysk, og maðurin Anders er svii. Tey búgva í svenska býnum Borlænge.

Húsini, tey búgva í, eru bygd 1947, og hava alt ov fá kømur til eina stóra familju. Alice og Anders vilja fegin hava børnini tætt hjá sær, tá tey sova, og tí var hugt eftir tí gamla pulturkamarinum, tá farið var undir at seta í stand.

– Pápi mín, Tróndur Streymoy, var her og hjálpti okkum at gera køkin, men so fingu vit hugskotið at fara undir at byggja tvær sengur til dreingirnar í lítla rúminum, sum næstan ikki hevði verið brúkt fyrr, sigur Alice Streymoy.

Tróndur hevur arbeitt sum timburmaður í Føroyum, og smekkaði skjótt sengurnar upp eftir tekning sum Anders hevði gjørt.

– Vit vildu hava sengurnar eitt sindur »hyttisligar«, og tí gjørdu vit tær rundu opningarnar, fortelur Alice.

Kamarið var málað hvítt, og gólvið slípað og hvíttlakerað.

Rúni og Atli skuldu deila kamarið, og Rúni, sum tá var 4 ár, gjørdi av at alt tað hvíta skuldi brótast av við einum »havtema«. Fiskar, hav, og blekksputtur skuldu nýtast at pynta við.

– Tað mesta av tí, vit hava brúkt at pynta við, er keypt á IKEA ella Lagerhaus. Tað sum er trupult við hesum kamarinum er, at tað bara er átta fermetrar, og tí kann onki stinga ov langt út, alt má vera smalt fyri at ikki taka ov nógv pláss, sigur Alice.

I endanum av tí avlanga kamarinum hava tey gjørt eitt hugnahorn við pútum og madrassum. Púturnar hava bókstavir á, og eru tað bókstavarnir hjá børnunum Rúna, Atla og Erlu.

– Hetta kamarið verður mest nýtt til at sova í og lesa í. Viðhvørt vilja børnini sleppa upp her at spæla, men oftast eru tey í spælikamarinum og taka tað róligt her, sigur Alice at enda.

*Orð & myndir: Inna Tørnroos*
inna@sosialurin.fo



Sakkosekkirnir eru mest til mammu og pápa, tá tey lesa góðanátt-søgu fyri Rúna og Atla. Gólvið var slípað og hvíttlakka. Máttan er frá Lagerhaus



Púturnar í hugnahorninum hava bókstavarnar hjá børnunum á. Rúni, Atli og Erla hava øll fingið hvør sínar fýra pútur í jólagávu. Her er tað lítla Erla, sum ummøblerar



Myndir av familjuni í Føroyum og Svøríki hanga á vegginum. Duratjaldið er frá IKEA og gevur kamarinum ein serligan dám. Diskokúlan hóskar væl saman við restini



Eitt lítið seingjarborð varð smíðað til sengurnar